Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður

Evni: Útbjóðing av bergholinum til Fámjins

1. Hví er undangóðkenningin av fyritøkum at bjóða uppá bergholið til Fámjins ikki avgreidd, nú freistin langt síðani er farin?

2. Hvørjar fyritøkur hava bjóðað seg fram og latið tilfar til undangóðkenningina, áðrenn freistin fór?

3. Nær verður kunngjørt, hvørjar fyritøkur hava latið tilfar inn, áðrenn freistina, og hvørjar eru undangóðkendar at bjóða?

4. Nær verður sjálv útbjóðingin av bergholinum framd, og hvussu er tíðarætlanin fyri at gera bergholið, tilkoyringarvegir – og nær er ætlanin at koyrandi verður?

5. Um ein kæra er komin um málið, hvaðani og til hvønn er hon komin, og hevur Landsverk viðgjørt hana og mælt til at útseta málið?

Viðmerkingar:
Freistin hjá fyritøkum at bjóða seg fram til undangóðkenningar at gera bergholið til Fámjins varð sett til Kristi himmalferðardag 13. mai 2021. Men freistin varð útsett nakrar dagar orsakað av, at heiligdagur var henda dagin.
Kortini er onki fráboðað um, hvørjar fyritøkur hava bjóðað seg fram, og hvørjar eru undangóðkendar at gera bergholið til Fámjins.
Tí verður spurt, hvør orsøkin er til hetta, nær hetta verður avgreitt, og hvør tíðarætlanin er fyri alla verkætlanina.

Á Løgtingi, 3. august 2021

Høgni Hoydal